ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208
110 Tórshavn

29. oktober 2021
Mál: 21/21540
Tygara Skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-060/2021

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-060/2021 eftir tingskipanini § 52a til Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismann í almannamálum, frá Rósu Samuelsen, løgtingsmanni, um rehabilitering og rehabiliteringsdepil

Fyrispurningur er ljóðar soleiðis:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at seta í verk eina yvirskipaða rehabiliteringslóg, sum fevnir um allar geirar innan rehabilitering?
2. Arbeiðir landsstýrismaðurin fram ímóti at seta á stovn ein rehabiliteringsdepil sum eina samskipaða tvørfakliga heildartænastu til kropsliga, sálarliga og sosiala viðgerð?
3. Um ja, nær og hvussu, og um nei, hvørjar eru grundgevingarnar?
4. Er samstarv millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið um nakrar framtíðarætlanir fyri rehabilitering?

Svar:

Innleiðandi verður víst til svarið til fyrispurning nr. 52-139/2020, dagfest 17. mai 2021, har greitt varð frá, at rehabilitering á almannaøkinum – endurmenning - fevnir um menning í breiðari merking við endamálinum, at viðkomandi borgari aftur fær eitt virkið lív, og við røttum umstøðum aftur megnar at klára seg sjálvan í størst møguligan mun. Stórur partur av virkisøkjunum hjá Almannaverkinum eru tí fevnd av økinum rehabilitering. Eitt høvuðsendamál við løgtingslóg um almannatrygd og tænastur sbrt. § 1, stk. 1 er at menna og endurmenna.

Til spurning nr. 1

Landsstýrismaðurin hevur síðan hon fekk ábyrgdina av almannaøkinum lagt fyri Løgtingið lógina um almannatrygd og tænastur, sum er eitt frambrot á almannaøkinum, eisini tá ræður um endurvenjing og viðlíkahaldsvenjing. Kunngerðir um endurvenjing og viðlíkahalsvenjing,

sum áseta nærri treytir fyri, nær ein borgari kann fáa endur- og viðlíkahaldsvenjing, eru eisini gjørdar.

Landsstýrismaðurin hevur eisini raðfest økið fíggjarliga og sett pengar av bæði í inniverandi ári og í komandi fíggjarlóg. Landsstýrismaðurin raðfestir fyrst og fremst at fáa lógina um almannatrygd og tænastur at virka fult út.

Til spurning nr. 2 og 3

Landsstýrismaðurin vísir á, at endamálið við løgtingslóg um almannatrygd og tænastum sbrt. § 1, stk. 1 er at menna og endurmenna, og at nógv av virkisøkjunum hjá Almannaverkinum eru beinleiðis endurmennandi í sær sjálvum, ella eru at meta sum ein týðandi partur av einari endurmenningartilgongd.

Til spurning nr. 4

Tað er eitt gott samstarv ímillum Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið um endurvenjingina. Tær lógarbroytingar og kunngerðir, ið eru settar í gildi um endurvenjingina, eru gjørdar í tøttum samstarvi ímillum Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið. Nevnast kann eisini, at ein samstarvsavtala er gjørd ímillum Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið á økinum.

Landsstýrismenninir á økinum hava í hesum valskeiðinum upprøfest endurvenjingina munandi og hava, í tí, sum er eftir av valskeiðnum, ætlanir um framhaldandi at upprøfesta endurvenjingina. Landsstýrismaðurin raðfestir fyrst og fremst at fáa lógina um almannatrygd og tænastur at virka fult út

Tórshavn 29. oktober 2021

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýrismaður í almannamálum